# BØNARLØTAN

Apríl 2017 32. árg.

## *1. Leygardagur* *Josva 15.1-19*




## ATLANTIC MISSION og JUVEL II

Atlantic Mission skipar 7. árið á rað fyri ferð við Juvel II til oynna Bømlo í Noregi. Teir fimm nevndarlimirnir verða við: Ruth Gaardlykke, Poul Johan Djurhuus, Páll á Lakjuni, Jógvan Páll Sevdal og Svenning av Lofti umframt manning og hjálparfólk. Í samráð við samkomur á Bømlo og føroyingar, ið har búgva, er skráin henda: 27. - 30. apríl Langevåg, 1. - 4. mai Urangsvågen og 5. - 7. mai Moster.



## KRINGVARPIÐ

2. apríl Útvarpsmøti, Hebron, Argir
23. apríl Sjónvarpsmøti, Lívdin, Hoyvík

## R7 (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Møtir í Eydnuni á Oyrarbakka

1. apríl kl. 20 og 2. apríl kl. 19.30: Svenning av Lofti, Svein í Prestgarði og Jens Bech.

## Evangeliskt sangtiltak í Norðurlandahúsinum

11. apríl kl. 19.30. Svenning av Lofti luttekur.

## Føroysk møtir í Jútlandi

| | |
|---|---|
| 8. apríl kl. 19 | í Aalborg, Bethaniakirkjan, Dag Hammarskjøldsgade 2A. |
| 8. apríl kl. 19 | í Esbjerg, Ådalsparken 33. |
| 9. apríl kl. 17 | í Vejle, Frelsunarherhølið, Staldgårdsgade 4 |

## TEILAND, Chiang Mai
## Corine og Sørin Joensen
## Eli 12, Aron 5, Noah Kristian 3



Sum børnini vaksa, gerast skúlaviðurskiftini torførari. Biðið um vísdóm og neyðugt tilfeingi at taka røttu avgerðirnar um hetta. Eg vitji samkomur og einstaklingar í Føroyum 25. mars - 6. apríl. Avtalið vitjan á sorinjoensen@gmail.com ella hjá Øssuri Andreasen, tel 218818.

## *2. Sunnudagur* *Jóhs. ev. 14.1-17*



**FØROYAR**
**Else og Poul Johan Djurhuus**
Poul Jóhan fer við Juvél II til Noregs. Nógv møtir verða hildin í landi, og fólk verða boðin umborð. Almenn móttøka verður í øllum havnum. 8. mai gongur leiðin aftur til Føroya. 16. - 18. juni fara Elsa og Poul Jóhan á bíbliu-og tónleikaferð við Norrönu til Hirtshals. Samskiparar eru Martin Dam Joensen á Smyril Line og Poul Jóhan. Bíbliutímarnar hava Svenning av Lofti, Zacharias Zachariassen, Jógvan Páll Sevdal og Símun Pætur á Torkilsheyggi. Tónleikararnir eru MC Restorff, Svein í Prestgarði og Dia Hvannastein.

**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 9, Svend 8, Terji 4, Petra 3**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

## *3. Mánadagur* *Josva 15.20-63*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 14**
Vit vitja í Føroyum 3. - 18. apríl. Eftir páskir hava vit árligu samtalurnar við næmingarnar í bólki okkara – biðið um vísdóm. Trý í bólkinum ætla at taka trúboðaravenjingina annað árið; hini trý fara heim at útbúgva seg.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Páll vitjar í Føroyum 5. - 24. apríl. Hann talar á samfelagsstevnuni í Bylgjuni í Runavík langafríggjadag kl. 19. Páll tel. 215181. Hesin veturin hevur kenst drúgvur. Kavin hevur verið tað dupulta av meðal. Skerdur førleiki hevur onkuntíð ávirkað mótið. Harrin er góður og sent „á okkara veg hjálp og mangt troystandi orð“ NSGF 1259. Tríggir menn eru sjálvbodnir komnir at hjálpa at grava kava. Fekk gott høvi at vitna fyri tí eina, sum lurtaði við eftirtekt og hevði ongan skund eftir kaffimunnin. Las bíbliuna saman við einum, sum fleiri ferðir er komin aftur og eisini havt konuna við. Fekk góð boð: Brotið í økslini er vaksið samanaftur og nervin liggur ikki í klemmu. Nú skal eg bara venjast uppaftur. Takk fyri forbøn!



**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 12, Micah 10,**
**Ezra 8, Uhenya 5, Boas 3**

Vit hava eina barnalegu afturat í apríl. Síðst vóru 120 børn á legu; vit vænta fleiri hesaferð.



**DANMARK**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 9, Andreas 7, Kristina 6**

## 5. Mikudagur — Josva 16.1-10



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit verða í Týsklandi og Onglandi fyrru helvt av mai og síðan í Indonesia og Filipsoyggjum til hálvan aug. Eg skal tala 6 ferðir á trúboðarastevnuni í Indonesia fyrst í juni. Tað má eg fyrireika meg til nú í apríl.



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Minnist møtini, serliga langafríggjadag og páskadag. Biðið fyri lovsangskóri, sangkóri, spælarum og John, at Harrin styrkir hann, sum hann fyrireikar seg til møtini.

## 6. Hósdagur — Sálmur 74



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

Páskalega verður 12. - 16. apríl í Balle Musik- og Idrætsefterskole, Ballevej 57, 7182 Bredsten. Sonni Poulsen hevur bíbliutímarnar fyri vaksnum og Jákup Hansen úr Klaksvík fyri ungum. Talað verður á donskum. Kunning um leguna fæst á maltalejr@gmail.dk ella hjá Edmund Joensen, tlf. +45 40192451 ella +45 98943775.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn, Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Siloakórið vitjar í Reykjavík, Akranesi og Kópavogi 7. - 10. apríl. Sigið fólki frá!

## *7. Fríggjadagur* — *Johs. ev. 15.1-27*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Eg skal møguliga undir skurðviðgerð í handliðnum í Skotlandi, vónandi innan 24. apríl, tí tá skal eg byrja undirvísingarskeið í málvísindi. Biðið eisini fyri umsetingararbeiðnum, sum heldur fram í Oaxaca.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**
**Jonathan Daniel 17, Ísak 14**

## *8. Leygardagur* — *Josva 17.1-18*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Joy 15, Adonia 8**

Stór luttøka er til skeiðini í trúarverju. Evangeliseringin á alnótini er rættiliga krevjandi. Biðið, at Gud leggur nøkrum á hjarta at verða upplærd í hesi tænastu, tí hon nær hvørja viku út til fleiri túsund føroyingar, og kemur at mynda komandi ættarliðið. Minnist Adoniu og okkum sum familju.

★ Í dag fyllir Ryan Clifford Jensen 8 ár.

## *9. Pálmasunnudagur* — *Johs. ev. 16.1-15*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Árliga stóra evangeliska átakið á Prinsess Island út fyri Istanbul verður 23. apríl. Biðið, at veðrið verður gott, og nógv fólk møtir upp. Týdningarmikla valið í Turkalandi verður 16. apríl.

## *10. Mánadagur* *Josva 18.1-28*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 11, Rebekah 9, Lydia 7**

Tá Craig var í kurdistan í Norðurirak í farna mánaði, møtti hann fleiri trúgvandi. Spurd um, hvussu tey gjørdust kristin, svaraðu 4 av 5, at tað var við at lesa Bíbliuna. Øll Bíblian er nú umsett og verður prentað, og ein app verður eisini ment, so enn fleiri kunnu hava Orð Guds á kurdiskum í hondunum.

## *11. Týsdagur* *Jóhs.ev. 16.16-33*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Samkomulega verður í Undløse á Sælandi á hvítusunnu. Hetta er týdningarmikil táttur í samkomulívinum, har vit seta tíð av og hava góðar karmar til bíbliuundirvísing og til samfelag. Øll eru vælkomin at tekna seg á: info@glostrupfrikirke.dk

**DANMARK, Brejning**
**Jan og Anne Zachariassen**

## *12. Mikudagur* *Josva 19.1-23*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 5**

Vit vitja samkomur í Føroyum 24. apríl - 16. mai. Biðið fyri Winu, sum hevur ryggpínu. Kontaktfólk: Eli Christiansen á ntm@mail.fo ella tel. 215566.

## *13. Skírhósdagur* — *Sálmur 75 og 76*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vit gleðast um javnan at síggja sjúklingabussin koyra inn í túnið í Kristnastovu við sjúklingum og avvarðandi, ið vilja hava samfelag við okkum. Biðið, at hesar løtur verða til signing – eins væl og andaktirnar á hotellinum.

**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Hannah 17, Eva 16, Miriam Joy 13, Noah 10, ???**

## *14. Langi fríggjadagur* — *Jóhs.ev. 17.1-26*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**



25. juni til 22. juli hava vit 2 barna-, 1 ungdóms- og 1 familjulegu í Nalersitaq við uml. 35 børnum á hvørjari býtt upp í 5 lið. Um vit skulu megna hesur legur, má hjálp koma úr Føroyum. Ulla og Jacob Tindalíð hava høvuðsábyrgdina av tveimum legum, eingin er til hinar báðar enn. Bert 5 fólk úr Føroyum hava teknað seg; tørvur er á øllum økjum. Tilmelding hjá Victoriu, tel. 272376, og Karsten Neshamar, tel. 259481. Tørvur er eisini á fleiri at arbeiða uppá vatnturbinuna og dieselmotorarnar. Ringið Thorvald tel. 231286.

**– Anna og Óli Steinberg**



*Turbinuhúsið.*

## *15. Leygardagur* *Josva 19.24-51*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit hava nú rindað innskot fyri bátin í Ný Foundlandi. Biðið, at allur peningurin verður tøkur, tá vit skulu keypa bátin í mai, og at ferðin til Qasigiannguit skal ganga væl. Vit eru takksom fyri opnar dyr.



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karin15**

## *16. Páskadagur* *Jóhs.ev. 18.1-23*



**NTM Føroyar**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 6, Tabita 3, Debora 1**

16. - 18. juni bjóða vit øllum áhugaðum á ráðstevnu hjá NTM í North Cotes í Onglandi um evnið „Make a difference“. Tilmelding ntm@mail.fo ella tel. 215566.



**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Lis og Zacharias Zachariassen**
**– Rutt og John í Skemmuni**

**VENESUELA, Puerto Ayacucho**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## 17. *Annar páskadagur* *Josva 20.1-9*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Dubby fór ikki til Senegal orsakað av illgruna um álvarsligan hjartatrupulleika, sum tó ikki var av týdningi. Dubby ætlaði at fara til Senegal at gera heimasíðu við bíbliuundirvísingini hjá Musa pastori, skrivað á saafi máli til Wolof- og Saafi-fólkið. Hetta er nú gjørt av øðrum bróðuri í landinum – sí http://baatu-yaakar.org – fólkið kann nú hoyra Orð Guds á egnum máli á fartelefon. Møguliga verður ein ferð í aug. ístaðin.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Agnas 14, Boas 9**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech, Jan 14**

## 18. *Týsdagur* *Johs.ev. 18.24-40*

**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 3, Micah 3**

Vit hava hátíðarhildið tvey ára dagin hjá samkomu okkara Redeemer Grace i Versoix. Harrin hevur ríkliga signað; vit undrast og eru takksom. Í mars og apríl hava vit næsta Alpha-skeiðið. Biðið um vísdóm at undirvísa, og at fólk finna svar. Vit verða í Føroyum 3. juli til 1. aug.

**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 14, Megan 12, Trisha 5, Emma 0**

## *19. Mikudagur* *Josva 21.1-26*

**USA, Nebraska, New Tribes Mission**
**Rachel og Peter Hansen, Steffan 17, Caleb 14**
24. - 27. apríl hevur altjóða nevndin hjá NTM fund. Okkum tørvar vísdóm og at kenna Harrans leiðslu. Heilsan hjá David (32) versnar so líðandi.

## *20. Hósdagur* *Sálmur 77*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen**
Natalie er við barn og hevur trupulleikar. Vit fara til Týsklands í juni tveir mánaðar undan føðing. Vit undirvísa á tekniskum skúla við 150 næmingum, sum hava stóran áhuga fyri Orði Guds. Okkum tørvar vísdóm.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 8, Noah 7, Karis 3, Judah 1**

## *21. Fríggjadagur* *Jóhs.ev. 21.1-14*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 7, Nana 5 og Louie 3**
Nú eru vit komin til Japan. Biðið, at tað skal ganga væl at leggja alt til rættis, og at Kano trívist í nýggja skúlanum.

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 6, Leah Eve 3**

## *22. Leygardagur* *Josva 21.27-45*



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

Vit eru takksom, at umsóknir til næsta skúlaár nú koma inn. Næmingarnir eru í praktikk hendan mánaðin. Vit mangla skrivstovufólk.

## *23. Sunnudagur* *Johs.ev. 21.15-25*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan Júst Rasmussen**

Cathy er lærari hjá Noah hetta skúlaárið og ætlandi eisini komandi skúlaár. Hon lærdi børnini hjá okkum, men tað er nærum tjúgu ár síðani, so hetta er ein avbjóðing; men eisini stórur framíhjárættur.

## *24. Mánadagur* *Josva 22.1-20*

**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 13, James 10, Micha David 7**

Nógvar broytingar henda hjá GoodSeed, serliga innan leiðslu. Eg komi møguliga at taka mær av bókhaldi. Eg síggi tørvin á hesum arbeiði, men biðið, tí bókhald er ikki nakað, eg brenni fyri.

**FILIPSOYGGJAR, Manila, Anja Nielsen**

**FILIPOYGGJAR, NTM, Liz og Ragnar Niclasen**

## *25. Flaggdagur* *2. Pætur 1.1-21*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Nógv færri koma nú til bíbliutímar, enn tá vit byrjaðu. Fleiri trúføst koma ikki longur. Nøkur nýggj andlit eru tó at síggja. Fleiri børn koma ofta, langt áðrenn Erik byrjar at undirvísa; tá lesi eg bíbliusøgur fyri teimum. Hetta dámar teimum væl. Eg havi brúk fyri fleiri og røttum málhjálparum, nú eg skal rættlesa Efesusbrævið.

★ Í dag fyllir Markus Tuohy 5 ár.

## *26. Mikudagur* *Josva 22.21-34*

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Jens Allan 15, Ryan 8**

Bíbliutímarnir fyri børn í skúlaaldri ganga væl. Tey møta ofta upp ein tíma frammanundan. Uppmøtingin til kvinnubíbliutímarnar hevur verið vánalig. Sana, ein trúgvandi, misti systur sína í gjár. Familjan, sum er muslimsk, liggur honum tungt á hjarta. Sana tørvar styrki. Hans Arni hevur havt svimbul seinastu mánaðirnar. Um hann ikki batnar skjótt, er ætlanin at fara til Dakar til lækna.

## *27. Hósdagur* *Sálmur 78.1-31*

**LANDSYNNINGSASIA**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 15, Jonathan 14, Leslie 14, Emily 6, Bethany 2**

Fleiri broytingar eru komnar viðv. umsóknum um uppihaldsloyvi; tí hava vit enn ongi arbeiðsloyvi.

## *28. Fríggjadagur* *2. Pætur 2.1-22*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 13, Rebekka 11, Hanna 8**

Í mars vórðu 35 kapitlar av 2. Mós. rættlisnir. Enn mangla 5 kapitlar, sum snúgva seg um tabernaklið, og sum ikki eru so lættir at rættlesa. Vit ætla, sum nakað nýtt, at kanna teir umvegis skype við Jógvan Júst í Italia. Umframt stóra tíðarmunin, so er internetið heldur vánaligt, og streymurin fer næstan dagliga her í býnum.

## *29. Leygardagur* *Josva 23.1-16*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 12, Victoria, 10,**
**Emma Grace 9, Jónatan 7,**
**Marcus 5, Evita Linda 2**

Haldið á at biðja fyri Nancy og Chava og teimum nýggju trúgvandi, sum koma til møtini. Vit takka fyri stuðulin og fegnast um byggiloyvini; vit eru farin at grava út fyri nýggja samkomubygninginum!


**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Selma Godtfred, Durita Olsen, Kristianna J. Heinesen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Jónvør Christiansen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

# MÍNI BØNAREVNI

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *30. Sunnudagur* *2. Pætur 3.1-18*

### OM FØROYAR og LOGOS HOPE
### Anita og Oddmar Tausen

Anita trívist væl sum fíggjarleiðari og bókhaldari hjá OM. Tey trý, Jóhan Petur, Guðrið og Anita, arbeiða sera væl saman. Eg havi persónligar samtalur við ungar gentur – tørvurin er stórur.
★ Í dag fyllir Rebekka Sharp 12 ár.

### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!




**Nýggj bók!**

**199 kr.**

Ravi Zacharias og Vince Vitale samanbera boðskapin hjá Jesusi við sekularismu og ateismu. Teir grundgeva gjølliga fyri, hví Kristus er heilt serligur í mun til sekularismu sum heild. Høvundarnir svara spurningum, sum tú og vinir tínir óivað seta; tí er bókin vælegnað at vísa til, tá spurningar um hesi viðurskifti stinga seg upp.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo